## Eftir sjúkum sjómanni

Føroyska bjargingartyrlan tók týsdagin ein mann av enska trolaranum Swanella

Trolarin var staddur 27 fjóðringar í ein útnyrðing úr Mykinesi. Ein av manningini var vorðin sjúkur, og kl. 12.10 vórðu boð send á MRCC støðina.

Bjargingartyrlan hjá Atlantsflog varð send avstað og tók eftir stuttari tíð mannin av enska trolaranum og flutti hann í øllum góðum á landssjúkrahúsið har maðurin varð innlagdur

-jm

## Terji Rasmussen live í Árhus

ÚTISETALÍV
*tíðindaskriv*

Tað er ikki á hvørjum degi, at útisetarnir í Árhus og Jyllandi fáa høvi til at leggja oyru til tónar frá Prix Føroyar finalistinum Terja Rasmussen, men leygarkvøldið 30. apríl verður hetta møguligt.

Síðan Terji veruliga steig á pallin við fløguni "Føstufressar" í 1989 hevur Terji verið roknaður sum ein av okkara fremstu tónleikarum. At hann framvegis er ein av okkara fremstu tónleikarnum prógvaði hann á pallinum í Norðurlandahúsinum seinasta leygarkvøld.

Góður stuðul frá Atlantic Airways og KALL hevur nú gjørt tað møguligt hjá Føroyingafelagnum í Árhus, at fáa Terja at leggja leiðina framvið.

Tiltakið sum byrjar kl. 22 og endar kl. 03, verður í hølunum hjá Føroyingafelagnum — vanliga nevnd Áarstova. Áarstova liggur í Vestergade 48 D, sum er miðskeiðis í býnum.

Meira fæst at vita um virksemið hjá Føroyingafelagnum í Árhus á: www.aarstova.dk

# Aldubáran í uppskoti til tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins

**Føroyski tónleikabólkurin Aldubáran telist millum uppskotini til at fáa tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins seinni í ár. Í Aldubáruni taka tey innstillingina sum eina viðurkenning av tí arbeiði, sum tey gera**

TÓNLEIKAVIRÐISLØN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Limirnir í Aldubáruni taka tað sum eina viðurkenning av teirra arbeiði, at tey nú eru í uppskoti til tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins.*
*Savnsmynd*

Herfyri kunngjørdi Norðurlandaráðið nøvnini á teimum, sum eru í uppskoti til at fáa tónleikavirðisløn ráðsins í ár. Í ár eru tað bert sonevnd ensemblir, so sum Aldubáran, ið eru innstillaði, og Aldubáran er ein av tilsamans ellivu kandidatum úr øllum Norðurlondum.

### Taka tað sum eina viðurkenning

Ein av limunum í Aldubáruni er gittarleikarin Ólavur Jakobsen. Hann sigur, at Aldubáran tekur tað sum eina viðurkenning av arbeiðnum hjá sær, at tey nú eru innstillaði til norðurlendska heiðurin.

- Vit eru ómetaliga errin av at verða innstillaði saman við hinum ensemblunum, ið eru í uppskoti, tí talan er um ensemblir á allarhægsta støði, sigur Ólavur Jakobsen.

Ólavur Jakobsen heldur tað hava sera stóran týdning fyri ensembli-tónleikin, at fokus soleiðis verður settur á hesa tónleikagrein, sum vanliga ikki fær so nógva umrøðu.

- Hetta slagi av tónleiki er sjáldan at síggja á forsíðunum, hvørki her heima ella í grannalondunum, men við innstillingunum til tónleikaheiðurslønina, hevur ensembli-tónleikurin verið nógv umrøddur í miðlunum í grannalondunum hjá okkum, sigur Ólavur Jakobsen.

Umframt sjálvan heiðurin fær vinnarin av tónleikaheiðurslønini hjá Norðurlandaráðnum eisini ein kekk áljóðandi 350.000 krónur.

Vinnarin verður avdúkaður í Århus tann 9. juni, og umboð fyri Aldubáran verða sjálvsagt hjástødd.

### Jubileumskonsert í summar

Aldubáran hevur annars nógvar ætlanir fyri framman. Bólkurin hevur í ár 10 ára jubileum, og í hesum sambandi fer Aldubáran at hava eina jubileumskonsert í Norðurlandahúsinum síðst í juni mánað.

Føroyska tónleikaskaldið, Sunleif Rasmussen, situr í løtuni og skrivar eina operu, og hesum arbeiði er Aldubáran eisini knýtt at. Nýggja operan verður tó ikki liðug fyribils, men verður væntandi framførd á fyrsta sinni komandi vár.

# Blue Foundation spæla á G! Festival

**Á heimasíðuni hjá dansk/enskt/japanska bólkinum Blue Foundation stendur at lesa, at bólkurin fer at spæla á G!festivalinum í Gøtu. Vit hava prátað við Jón Tyril fyriskipara um bólkin og um festivalin í ár**

G!-FESTIVAL
*Niels Uni Dam*



Blue Foundation siga á síni heimasíðu, at teir spæla á G-Festivalinum í ár, kunnu tit vátta hetta?

Jep, so er tað alment. G! Festival proudly presents: BLUE FOUNDATION

Hví hava tit valt at takað hendan bólkin til Føroyar?

Summi ting lata seg ikki nokta. Fyri nøkrum mánaðum síðani kendi eg ikki tónleikin hjá Blue Foundation. Men navnið poppaði upp allastaðni har sum prátið fall á hvørji spennandi nøvn tóku seg fram, hvat tað besta var í Norðanlondum osfr. Hetta var galdandi bæði tá vit tosaðu við bransjufólk og "vanlig" fólk við áhuga fyri tónleiki.

Tá so Hergeir, sum arbeiðir fyri okkum, spældi Blue Foundation fyri mær fyrstu ferð, visti eg straks, at hendan bólkin mugu vit hava á G!. Bólkurin er tiltikið góður livebólkur og varð m.a. nomineraður til 5 Danish Music Awards herfyri.

Blue Foundation er ein vælumtóktur, men samstundis sera eksperimenterandi bólkur. Nøkurlunda somu orð kunnu brúkast um G! Festivalin. Verður hildið fast í tí eksperimenterandi tónleikaprofilinum í ár. Ella kunnu vit vænta meira mainstream nøvn í stíl við tað sum Summarfestivalurin bjóðar?

Satt er tað at G! í sær sjálvum er ein experimenterandi verkætlan. Men vit hava frá byrjan lagt okkum eftir at hava so breitt tónleikaligt útboð, sum vit hava megnað, har vit samstundis hava hildið góðskuna og íblásturin í hevd sum absolut loysnarorð. Vit hava hildið tað bæði fólkaligt og eksperimenterandi, men allatíðina við broddi og viðkomandi - haldi eg sjálvur.

Vit siga í endamálsorðingini, at G! leggur seg eftir at bjóða góðan tónleik til eina fjölbroytta fjöld, knýta Föroyar uppí tónleikaheimin kring okkum, geva föroyskum tónleikalívi íblástur og avbjóðingar, at sýna fram tað besta innan föroyskan tónleik, og at menna föroyskan tónleik.

Vit hava eitt publikum áljóðandi nærum 10% av fólkinum í landinum pr. dag. Tað krevur, sum vit eisini siga í endamálsorðingini: G! Festival SKAL verða góðska fyri ØLL.

Tí royna vit at hava eina rúgvu av upplivingum fyri áhoyraran. Vit vilja loyva eksperimentum á G! fyri at geva fólki eitt stórri og ríkari upplivilsi.

Fólkakær nøvn hoyra avgjørt heima á G! eisini í 2005 eins og undanfarin ár, og vit koma at kunngerða fleiri av teimum eisini næstu vikurnar.

Sum er, vita vit um Go Go Blues, Makrel og Blue Foundation, eru onnur nøvn komin uppá pláss?

Ja, vit hava størsta partin av tónleikinum bókaðan og fara næstu dagarnar so við og við at kunngerða fleiri av luttakandi nøvnunum, samstundis sum vit hava samráðingar í gongd við fleiri onnur sera spennandi tónlistarfólk.

Slaturin gongur um at Nephew eru í samráðingum við G-festivalin, kanst tú vátta hetta?

Eg kann vátta at ein fyrispurningur er úti, men tað er so eisini alt, eg kann siga á hesum sinni viðvíkjandi tí.